


**Nr. 1** ***2. januar 2022*** **82. árg.**

# Freistingar

*Freistingar koma inn gjøgnum okkara sansir: smakkur, sjón, luktur, kenslur og hoyrn. Her skulu vit taka tvey dømi úr Skriftini, har freistingin smýgur sær inn gjøgnum sjónina. „Tá ið nú konan (Eva) SÁ, at træið var gott til matna…“ 1. Mós. 3,6.*

Ádam og Eva høvdu fingið boð um ikki at eta av trænum. Hetta var einasta boðið, tey høvdu. Nú hava vit tíggju boð. Einasta staðið, djevulin kundi fáa tey at falla, var við hetta træið, tí lá hann har og bíðaði. Eva hevði ikki ætlað sær at bróta boðið, men bara fara yvir at **HYGGJA.** Vit skulu minnast til, at freistingin er sum ein sterk magnet, og vit eru sum jarnpettið. Koma vit ov nær magnetini, so svupp, dregur hon okkum til sín, og vit hanga føst. Vit skulu lata vera við at leita upp tað, sum vit eru veik fyri. Hetta fekk vanlukkuligar fylgir fyri tey. Tey vóru farin í part við djevlinum, fígginda Guds, og vóru rikin út úr Edens urtagarði, og við tí fylgdi hart arbeiði, stríð og strev, og deyðin trongdi ígjøgnum til okkum øll.

„Tá ið Lot leit seg um og **SÁ,** at allur Jórdanslættin var land eins og aldingarður Harrans…“ 1. Mós. 13,10.

Ábram, sum hann kallaðist tá (seinni broyttist navn hansara til Ábraham) og bróðursonur hansara, Lot, áttu nógv kríatúr, og tí kundu teir ikki búgva saman. Ábram læt Lot velja sær tað økið, ið hann vildi. Lot var ikki serliga eyðmjúkur. Hann valdi sær tað besta. Hann skuldi latið Ábram, sum var nógv eldri enn hann, sloppið at valt fyrst. Lot spurdi heldur ikki Gud til ráðs, og tað kom at kosta honum dýrt, tí Sodoma og Gomorra

vóru ógvuliga syndafullir býir, og tá ið Harrin læt eld og svávul regna niður yvir teir, og Lot við familju síni flýddi yvir háls og herðar, vendi kona Lots sær við fyri at **SÍGGJA,** hvat ið hon fór frá. Hetta var beint ímóti boðum Guds, og hon varð til ein saltstólpa.

So kunnu vit sjálv hugsa víðari, hvussu syndin kemur inn t.d. gjøgnum hoyrnina (oyrað) og smakkin (munnin).

„Eg orð tíni goymi í mínum hjarta, fyri at eg ikki skal synda móti tær." Sálm. 119,11. Hetta er loysnin, at fylla seg við Guds orði.

*Effie Campbell.*

# Kristnir bøndur

Elisabeth Mork hevði eina samrøðu við Ivar Skjulestad á Kanal 10. Hann greiddi frá, at hann var uppi í Jesus-rørsluni fyrst í 1980-árunum. Seinni kom hann upp í „Kristnir handilsmenn", og fyri nøkrum árum síðani var hann við til at seta á stovn „Kristnir bøndur", eins og teir hava tað yviri í Svøríki.

Í Málaki 3,10–11 stendur: „Berið alla tíggjundina í goymsluhúsið, so at føðsla verður í húsi mínum, og roynið meg við hesum, sigur Harri herliðanna, um eg ikki tá lati tykkum himinsins lokur upp og ríkliga helli út signing yvir tykkum. Og eg vil **kísta átvargin** (grashoppuna og øll flogkykt) burtur, so at hann ikki oyðir tykkum ávøkst jarðarinnar og spillir ikki gróður víntræsins, sigur Harri herliðanna." Ongantíð hevur gularótaflugan verið í mínum veltum, og eg eri sloppin undan at taka ókrút upp. Men vit mugu liva eftir Guds grundreglum, og her verður sagt, at **um** vit geva Gudi tíggjundin, so skal hann… Hetta er ein lívsstílur. Eg troki meg inn til Gud í mínari neyð. Traktorurin var í ólagi, og eg hevði ikki ráð at fara á verkstað við honum og gjalda 30.000 kr. Eg legði hendurnar á hann og bað Gud grøða hann. So setti eg meg upp í hann, og hann startaði beinanvegin og hevur gingið síðani. Vit uppliva fleiri undur á garðinum enn í meinigheitini.

Jesusar sigur á krossinum fevnir um alt, sum djevulin hevur oyðilagt, eisini um moldina. „Tað er **fullgjørt**," segði Jesus. Tá ið okkurt ikki riggar, so skalt tú ikki stríðast við tað í meir enn 10 min. Bið tá til Harran. Bøndur hava nógvar trupulleikar. Teir eru trongdir fíggjarliga og missa mótið, tí samfelagið

hevur ikki lagt tað til rættis fyri teir. Tí eru fleiri teirra tungir í huga. Vit royna at eggja teimum til og siga, at hetta tú gert at velta jørðina, er ein tænasta fyri Harran, og so biðja vit: „Má Harrin miskunna tær og vælsigna teg og tín garð, og má hann lata tað eydnast fyri teg.“ Gud sigur í orði sínum, at tað er altíð gott at hava ein kong, sum syrgir fyri, at jørðin verður dyrkað. (Præd. 5,8).

„Um fólk mítt, sum navn mítt er nevnt yvir, tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vondu vegum sínum, **tá** vil eg bønhoyra tey á himni og fyrigeva syndir teirra og **grøða land teirra**.“ 2. Krýn. 7,14. Vit mugu eyðmýkja okkum, hjartað kemur fyrst, so moldin. Gud hevur skapt alt, og tí hevur hann skil fyri, hvussu alt her á jørð virkar. Jesu sigur á krossinum er so stórur, hann fatar um alt.

*Effie Campbell.*

# Andlit til andlits

Ivar Skjulestad greiðir frá, at hann var á einum skeiði, sum upprunaliga kom úr Amerika og kallaðist „Face to face“. Hetta skeiðið vardi í 21 dagar, og 10–12 luttakarar vóru í hvørjum bólki. Undirvísingin gekk út frá tí, tey trúgvandi kalla 7/14, og er tað 2. Krýn. 7,14: „Um fólk mítt, sum navn mítt er nevnt yvir, tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vondu vegum sínum, tá vil eg bønhoyra tey á himni og fyrigeva syndir teirra og grøða land teirra.“

Vit fyrireikaðu okkum til sjálva undirvísingina við at justera, minka um larmin frá verðini, t.d. frá sjónvarpinum. Har er so nógv, sum ikki er gagnligt, og sum eitrar sinnið. Tað byggir okkum ikki upp, har eru nógv ring tíðindi, sum bara økja um stúranina. Vit innstilla hjartað og víga okkum heilt til Harran. Vit „eyðmýkja“ okkum, men hetta hevur einki við Jantelógina at gera, sum sigur, at tú skalt ikki halda, at tú ert nakað. Hetta er út frá omanfyrinevnda skriftstað „tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vondu vegum sínum, tá vil eg bønhoyra…“ Hetta er viljin til at vera heilhugaður. Vit vilja vera Gudi undirgivin.

Tá ið vit soleiðis hava reinsað høvdið, venda vit tankarnar til Harran og fara undir at biðja: „Gud, reinsa mínar tankar, vís mær, hvussu eg skal eyðmýkja meg fyri tær.“ Gud talar inn

gjøgnum tankarnar hjá okkum og vísir okkum ting, sum vit skulu leggja frá okkum, synd, sum skal játtast, tankar, sum skulu justerast. Gud arbeiðir upp á hjørtuni – tí tað er nakað, sum hevur ævigt virði – mótvegis mínum traktori, sum Harrin fekk aftur í rættlag.

At eyðmýkja seg fyri Gudi, at vera honum undirgivin, er so týdningarmikið, tí tá kunnu vit standa ímóti djevlinum og hava andaligan myndugleika: „Verið tí Gudi **undirgivnir**! Men standið ímóti djevlinum, og tá skal hann flýggja frá tykkum.“ Ják. 4,7 Latið okkum liva í tí fyrsta kærleikanum (Opb. 2,4).

*Effie Campbell.*

## Hvat kostar tað at vera trúgvur?

**Tað kostaði** Ábrahami, at kravt varð av honum, at hann skuldi ofra einasta son sín.
**Tað kostaði** Ester at seta lív sítt í váða.
**Tað kostaði** Dánjali at verða kastaður í leyvubølið.
**Tað kostaði** Sjadraki, Mesjaki og Abed-Nego at verða kastaðir í hin gløðandi ovnin.
**Tað kostaði** Stefani at verða steinaður.
**Tað kostaði** Pæturi at doyggja sum pínslarváttur.
**Tað kostaði** Jesusi at doyggja á krossinum.

**Hvat kostar tað tær?** *Kostar tað tær nakað?*

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tey bæði amboðini, sum eru bestu vápn móti brennivíns-djevlinum, eita: *bøn og føsta.* *e.c.* ums.

---

Sunnudagsblaðið
ynskir øllum eitt
av Harranum signað nýggjár

---

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2. jan. | **Tekstur:** | Luk. 1,5–25 | **Bíbliuorð:** | Luk. 18,27 |
| 9. jan. | **Tekstur:** | Luk 1,57–68 + 76–80 | **Bíbliuorð:** | Sl. 143,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 2** ***16. januar 2022*** **82. árg.**

# Grøðing yvir landið

Í einari talu, segði Håkon Fagervik nakað soleiðis: „Í 2. Krýn. 7,14 stendur: „Um fólk mítt, sum navn mítt er nevnt yvir, tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vondu vegum sínum, tá vil eg bønhoyra tey á himni og fyrigeva syndir teirra og grøða land teirra.“ Hevur tú hoyrt nakað so undurfult, at um vit venda um og fara í bøn, so skal **Harrin senda grøðing yvir landið**? At vera ein forbiðjari er ein stór náði, tí Gud kundi gjørt hetta sjálvur, men nú sleppa vit at vera hansara medarbeiðarar. Í bókini um bøn hjá Oddvari Søvik greiðir hann frá einari gamlari bønarkonu, sum búði niðri við áarbakkan. Hon hevði ein langan bønarlista, og á honum stóðu nøvnini á bygdarfólkunum. Hvønn dag bað hon fyri teimum, og hon bað Harran gera tað so, at vatnflóð ikki kom inn í kjallaran, tí tað hevði hon einaferð upplivað, og tað var alt annað enn stuttligt.

So breyt vekingin út í bygdini, og prestur fór inn til konuna og bað hana vísa sær bønarlistan. Tá vísti tað seg, at øll fólkini, sum stóðu á listanum, vórðu frelst í hesi vekingini. Árið eftir at konan doyði, streymaði vatnið inn aftur í kjallaran.

80% av forbiðjarum eru kvinnur, tær hava so eymt hjarta. Tað síggja vit nógv dømi um í Bíbliuni. Hanna bað og fekk Sámuel, sum kom at broyta alla søgu Ísraels. Anna Fanuelsdóttir bleiv drigin inn í templið, tá ið tey komu har við Jesusi. Nú eru tað vit. Ganga vit undir treytir Harrans, so hevur hann lovað at grøða landið. Vit mugu biðja um eina ungdómsveking. 48% av ungdómunum, sum í dag fara til lækna, hava álvarsligar

sálarligar trupulleikar. Jesus hevur givið okkum eitt bønarevni: „Biðið tí hann, sum akurskurðin eigur, at hann vil senda út arbeiðsfólk at heysta inn skurðin.“ Matt. 9,38. Vit draga signingar inn yvir landið við bøn.

Tað er eitt stríð í andaverðini. Satan veit, at nú er tíðin sera stutt hjá sær, og hann leggur eftir teimum ungu. Presturin í Karasjok sendi boð eftir mær at koma og halda møtir. Ein sjálvmorðsbylgja hevði verið har. Tólv ungdómar høvdu tikið lívið av sær. Eg var har tíðarskeiðið 1988–1989. Tað var ein tjúkkur veggur av myrkri og depressión yvir bygdini. Trý fólk bóðu í tríggjar mánaðir. Vit talarar bóðu og fastaðu. Ein bønarkvinna, sum hevði biðið fyri mær í mong ár, ringdi og segði: „Gud hevur víst mær eina sjón. Í kvøld kemur fyrsta aldan yvir Karasjok.“ – „Her er einki op, tað er hart og tungt, og eingin kemur á møti,“ svaraði eg. Men hon fekk rætt. Hetta kvøldið streymaðu fólk á møti og 13 ungdómar blivu frelstir, og henda vekingin breiddi seg til Svøríkis, Finnlands og til Kolahálvoynna í Russlandi.

Bønarvaktir á múrinum, tað er tað, okkum tørvar. Takka og lovprísa Gudi, áðrenn tú fært bønarsvar. Frøin og gleðin liggur í Gudi, ikki í umstøðunum. Jes. 62,6–7: „Eg havi sett varðmenn upp á borgargarðar tínar, Jerusalem; teir skulu ongantíð tiga hvørki um dagar ella nætur. Tit, ið áminna Harran, unnið tykkum onga hvíld og gevið honum ongan frið, fyrr enn hann hevur bygt upp aftur Jerusalem og gjørt hana til frægdar á jørðini.“

*Effie Campbell.*

# Profetiini

Guds gáva til okkara er eisini pakkað inn í profetiir. Millum milliardir av bókum skilir Bíblian seg burtur úr øllum øðrum bókum av sínum **profetiska innihaldi**.

Sjálvt ateistiskir serfrøðingar og talnørdar viðganga, at tað er ikki møguligt, at tey gomlu profetiini (t.e. forsagnir) í hundraðtali, ið eru nevnd í Gamla Testamenti, kunnu ganga út, blíva uppfylt.

Men tað gera tey – prísaður veri Gud! Øll profetaorðini um fyrru komu Jesusar gingu út! Og øll profetaorðini um aðru komu Jesusar fara eisini at ganga út – enntá við rúkandi ferð!

Gud sigur í Jes. 46,10: „Eg, sum frá upphavi kunngeri endan og langt frammanundan tað, ið enn ikki hevur hent, Eg, sum sigi: „**Ráð mítt skal ganga út, og alt tað, ið Eg vil, geri Eg**!“ (V.D.)

Dávid kongur sá Golgata 1000 ár, áðrenn tað hendi – nágreiniliga lýst í Sálmi 22: „Gud mín, Gud mín, hví ert tú farin frá mær?“ Sálmur 22,2 Ja, hetta vóru orðini, Jesus bað á krossinum.

**Sálmur 22,9:** „Hann á Harran leit sínar leiðir, hann hjálpi honum, hann bjargi honum við tað, at hann hevur hans yndi!“ Og hesi orðini søgdu spottararnir við krossin. Matt. 27,43.

**Sálmur 22,17:** „Teir hava stungið meg gjøgnum hendur og føtur.“ Júst soleiðis doyði Jesus.

**Sálmur 22,19:** „Teir skifta míni klæði sín ámillum, um kyrtil mín kasta teir lut.“ Hesi profetisku orðini gingu út í Jóh. 19,23–24, tá ið teir rómversku hermenninir kastaðu lut um kyrtilin hjá Jesusi.

Soleiðis talar Guds profetiska orð! Eisini um ta tíð, vit liva í = Endatíðina! Og Jesus spyr í Luk 12,56: „Hvussu ber tað til, at tit duga at skyna á teknunum á jørðini og á himmalinum, men ikki á tíðini, tit liva í?“ (N.S.).

Vit liva í einari profetiskari tíð, sum er fullgingin, komin á soppin. Gud vil, at vit skulu kunna týða tíðarinnar tekin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Aftur til tað gamla evangeliið

Vit mugu fara aftur til tað gamla evangeliið. Skrivað stendur um Ísak, at hann læt grava út aftur teir brunnar, sum faðir hansara hevði grivið, og sum filistar høvdu tipt. (1. Mós. 26,18). Tað er tað, vit mugu gera, vit mugu aftur til Orðið.

Alt evangeliið, sum tað er, stendur í einum kendum skriftstaði, sum vit nú fara at petta sundur. „**Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna…“** Tað byrjar altso við kærleika, einum so ófatiliga stórum kærleika, at Gud gevur tað besta og tað einasta, sum hann eigur, einkarson sín. Hvør fær so hesa stóru gávu?… **til tess at ein og hvør, sum trýr á hann**… Hvør fær so gávuna? Tað gera tey, sum trúgva á sonin, Jesus, tað vil siga, vit trúgva, at hetta er sannleiki, og vit taka ímóti honum, tá ið vit bjóða honum inn í hjarta okkara… **ikki**

**skal glatast**. Tað er altso ein møguleiki at glatast. Tað gera tey, sum venda sær burtur frá Jesusi og einki vilja hava við hann at gera… **men hava ævigt lív**. Tey, sum trúgva á hann og við gleði taka ímóti honum, tey fáa gávuna „ævigt lív".

Her er skriftstaðið samanhangandi: „Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív." Jóh. 3,16.

*Effie Campbell.*

# Meiningin við lívinum

Mong ung seta spurningar um lívið. Tað má vera meir enn bara at arbeiða, eta og sova. Hvussu fái eg eitt gott lív? Tíverri leita tey á skeivum staði og vevja seg inn í New Age og tað okkulta, og tá verður rættiliga galið, tí tá ein tíð er fráliðin, fáa tey tað ræðuliga ringt. Tey verða hertikin av ótta og øllum illum.

Tað er synd, tí hjálpin er so nær. „Hjartað hvílir ikki, fyrr enn tað hvílir í tær, o Gud." Hví? „Tí ævina hevur hann (Gud) lagt í hjørtu teirra." Præd. 3,11. Tí er loysnin tann, at vit biðja Gud fyrigeva okkum allar syndir okkara, og so bjóða vit Jesusi inn í hjartað. Tá flytur hann inn og hevur gávur sínar við: kærleika, frið, gleði o.s.fr. Gal. 5,22.

*Effie Campbell.*

---

Dánjals Bók er heimssøgan, skrivað frammanundan. – Profetiini hava nógv at siga:

„Nei, Harrin, drottin, ger einki uttan at birta loyndarráð síni fyri profetunum, tænarum sínum." Ámos 3,7. – 700 profeti um Jesus, sum standa í Gamla Testamenti, eru uppfylt. Tí fáa vit áminningina at LESA Guds orð. „Legg tær, inntil eg komi, eina við UPPLESTRINUM, áminningini, læruni." 1. Tim. 4,13.

---

Framtíð tín er ikki og fer ongantíð at vera í hondunum á menniskjum. Hon er í Guds hondum, og tað, Hann eigur, verjir Hann, og syrgir Hann fyri.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 16. jan. | **Tekstur:** | Luk. 2,21–23 + 36-38; 3,21–23a | **Bíbliuorð:** | Luk. 3,22b |
| 23. jan. | **Tekstur:** | Matt. 4,18–22 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,19 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74